Álit

í

løgtingsmáli nr. 45/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um revsing (Revsilógin) (Um kynsliga avnoyðslu og lokking)

Landsstýrismaðurin í lógarmálum, Bjarni Kárason Petersen, hevur lagt málið fram tann 3. november 2023, og eftir 1. viðgerð tann 8. november 2023 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 21. og 28. november 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Brotsfrøðifelagið, Kvinnuhúsið, Barnabata, KRIS, fyriskipanina RÓWT (fyrr *Megna títt lív*), SSP-Ráðgevingina, Barnaverndarstovuna, Føroya Politi, heildarverkætlanina Sig frá!, Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í almanna- og mentamálum, og Bjarna K. Petersen, landsstýrismann í lógarmálum.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Revsilógin er ein hin týdningarmesta lógin í samfelagnum. Við henni verður ásett, hvat er revsivert, og hvussu revsað verður. Revsilógin má tí endurspegla samfelagið, vit liva í. Talgildingin av samfelagnum hevur havt við sær, at vit stóran part av okkara lívi ferðast á netinum. Soleiðis er tað ikki minst hjá børnum og ungum, og tey skulu vera trygg á netinum. Tí mugu vit gera alt fyri at verja tey, tá tey ferðast á netinum.

Talið á kynsligum brotsverkum á netinum í Føroyum og í grannalondunum er vaksandi. Tað snýr seg um m.a. deiling av myndum, talgildar hóttanir og kynsligan harðskap. Tað er eisini lætt hjá fólki at geva seg út fyri at vera ein javnaldri ella annar persónur og á henda hátt koma í samband við børn og ung við tí fyri eyga at fremja kynslig brotsverk móti teimum.

Lokking og kynslig avnoyðsla er ikki í nóg stóran mun fevnt av ásetingunum í kapitli 24 í revsilógini, og tí verjir revsilógin ikki børn og ung nóg væl, tá tað snýr seg um hesi viðurskifti.

Lokking eru støður, tá ein persónur byggir upp eitt samband við ein undir 18 ár við tí fyri eyga at fremja kynslig brotsverk móti viðkomandi. Tað er tilgongdin, har persónurin fyrireikar at fremja eitt brotsverk móti einum undir 18 ár, ið verður revsiverd. Ásetingin kann bara brúkast í førum, har gerningsmaðurin er eldri enn órættaði.

Ásetingin um kynsliga avnoyðslu minnir um tær gerðir, ið eru fevndar av § 225 í revsilógini. Men kynslig avnoyðsla er ikki fevnd av hesi ásetingini, tí í hesum førinum fær gerningsmaðurin órættaða at fremja gerðirnar á seg sjálvan.

Nevndin heldur, at vit eiga at hava meira kunnandi tilfar á føroyskum og styrkja fyribyrgjandi átøkini á hesum øki. Vit hava tørv á einum betri talgildum dannilsi og áhaldandi at læra børn og ung at ferðast

trygt á netinum. Tørvur er eisini á eini telefonlinju ella ráðgeving, ið børn og ung kunnu venda sær til fyri at fáa hjálp ella onkran at tosa við. Heildarverkætlanin Sig frá! og SSP-Ráðgevingin arbeiða longu við átøkum á hesum økjum, og sum ein liður í at fyribyrgja, at børn og ung koma í hesar vanlukkuligu støður, heldur nevndin, at hetta arbeiðið eigur at verða styrkt.

Við hesum viðmerkingunum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 5. desember 2023

Hervør Pálsdóttir forkvinna	Helgi Abrahamsen næstformaður	Kristianna W. Poulsen
Henrik Old	Kim Durhuus	Steffan Klein Poulsen

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur